


*Kristina S. Hansen, sjónleikari: - Leikluturin Elin setur tingini í perspektiv, men eg haldi eisini, at tað er gott at flenna at sær sjálvum við hvørt. Hetta er ikki nakar klassiskur leikur, men ein mynd, sum avspelgar nútíðina.*

hægri starv og meira í lønarposan. Ein trupulleiki er eisini, at partar av uppalingini av børnunum liggur aðrastaðni enn heima hjá foreldrunum.

– Tað kennist sum er rákið í nútíðini, at familjur skulu hava so nógvar fyriskriftir at ganga eftir, fyri at sita til vanliga familjumynstrið. Elin lesur um kanningar og hagtøl fyri at uppfylla fyriskiftirnar, hvussu hjún skulu liva saman. Tá hon lesur um eina hagtalskannning, sum sigur, at røtt hjún skulu hava sex tvær - tríggjar ferðir um vikuna, verður hon ørkymlað, tá hon kemur í tankar um, at hon og maðurin bert hava sex tvær ferðir um mánaðin. Tað noyðist hon at gera nakað við, hóast hon hvørki hevur hug ella stundir.

Í einum vikublað hevur hon lisið um 10 hættir at tekkjast manninum. Hon velur ein burtur úr, sum er at balla seg inn í sellofan. Tá maðurin kemur heim, skal hon liggja innballað sum ein sexpakki hjá manninum at pakka upp.

– Tað er eisini soleiðis í veruleikanum, at fólk hava so nógv um at vera, og at tey ikki hava stundir ella orku at uppfylla krøvini, sum verða sett teimum, sigur Kristina S. Hansen.

– Sum Elin sigur einastaðni, at hon noyðist at gera tíðarætlan fyri vikuskiftið, av tí at bæði foreldur og børn hava so nógv at gera. Tey skulu til fótbólt, bjóða fólki til døgurða, fara í kirkju o.s.fr., umframt at hava stundir til sex.

– Kann hesin leikurin læra okkum nakað?

– Hann sigur ið hvussu so er, at vit noyðast at taka okkum stundir, sjálvt um tað ikki altíð riggar so væl, so sum í royndini hjá Elini.

– Hartil kemur, at opinleikin um sex er so nógv størri í dag, enn áður. Fólk koma í tvístøðu, tá tey ikki at fáa tíð til alt í vikuskiftinum, umframt alt annað í gerandisdegnum.

## Kravmikil leiklutur

Kristina sigur, at leikurin stendur og fellur við spælinum hjá henni, og hvussu væl hon er uppløgd tá framførsla er, men viðgongur, at tað hava verið onkrar "móðar" framførslur, av tí at einmansleikluturin er so strævin. Hon skal spæla seg gjøgnum handritið, sum er umleið 40 A4 síður til støddar. Tað krevur nógva orku, men sjónleikarar eru eins og onnur fólk. Teir hava góðar og minni góðar dagar.

– Hava kvinnurnar verið í meirluta til sýningarnar?

– Tað er so ymiskt frá kvøldi til kvøld. Onkuntíð hava kvinnurnar verið í meirluta, meðan tað onnur kvøld hava verið nógv mannfólk - og teir flenna eisini í skellilátri.

– Heldur tú at kvinnur gera so nógv sum Elin, fyri at tekkjast monnum sínum?

– Kvinnur eru helst soleiðis háttaðar, at tær vilja vera perfektar sum mammur og konur, og halda tað verða neyðugt at fornýggja kynslívið, fyri at halda spenninginum til hitt kynið uppi.

– Soleiðis er kanska ikki í Føroyum – og kortini – tíðin er øgeliga hektisk eisini hjá okkum, kvinnur eru partar av samfelagnum og noyðast at fylgja við, annars dragnar tær burtur úr. Tað kunnu kvinnur í Føroyum heldur ikki loyva sær, tí vit mugu hava tveir lønarposar, fyri at fáa endarnar at røkka saman, sigur Kristina.

– Hvat kann hesin leikur læra okkum?

– Við hesum leikinum kunnu vit varpa ljós á ymiskt í tilveru okkara, og seta spurnartekin við, hví vit jagstra okkurt, sum vit ikki vita hvat er. Er veruleikin tann, at vit bert skulu vísa okkum úteftir?

– Eg haldi eisini tað sigur nakað um samfelagið, at kvinnur lata seg ávirka av hagtalskanningum, hvussu ofta hjún skulu hava sex o.s.fr.. Hetta er ikki óvanligur lesnaður í bløðunum.

– Sum Elin sigur í leikinum, sex kemur í síðstu rekkju, ella mugu vit bara gera tað um morgunin. Kanska er tað ein spurningur um javnrættindi millum hjún, og um at býta uppgávurnar millum sín, sigur Kristina S. Hansen og leggur aftrat:

## Veruleiki ella parodi

– Tað er í lagi at kvinnur fara út á arbeiðsmarknaðin, men veruleikin er, at tær framvegis hava somu umsorganaruppgávur og skyldur og áður. Tær skulu bert kvika sær at fáa alt frá hondini heima, áðrenn tær fara til arbeiðis.

– Kunnu vit brúka søguna hjá Elini til nakað?

– Hon setur ið hvussu er tingini í perspektiv, men eg haldi eisini, at tað er gott at flenna at sær sjálvum. Er tað so illa statt, ella? Hetta er ikki nakar klassiskur leikur, og tað er eitt lættilsi við hvørt, men ein leikur, sum avspelgar nútíðina - og ikki tað stóra dramaið.

– Heldur tú at hesin leikurin verður eins aktuellur um 10 ár?

– Eg veit ikki um hann yvirhøvur sigur okkum nakað um 10 ár. Tá hava vit kanska funnið annað mynstur millum kvinnu og mann, sum ikki líkist tí, sum er galdandi í dag.

- Tú kanst kanska eisini siga, at Elin bert er ein nútíðar avbronglan ella parodi av kvinnuni, sum altíð skal vera í góðum lag og síggja gott út, sigur Kristina S. Hansen.